# TÍÐINDI

SAMBAND
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
TLF 341800

*– Festivalurin tekur skap fyri hvønn tíma, sum fer. Tað er sumt, sum vit ikki fá gjørt fyrr enn stutt áðrenn. Men tað gongur væl*

*Steintór Rasmussen, fyriskipari av Summarfestivalinum*



*Heðin Mortensen setur hakan í fyri nýggja skúlanum í Hoyvíkshaganum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Nýggjur skúli á Løgmannabreyt um tvey ár

**Seinnapartin í gjár setti Heðin Mortensen borgarstjóri hakan í fyri skúlanum við Løgmannabreyt, sum Tórshavnar kommuna letur byggja**

ÚTBÚGVING
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Útgrevsturin og planeringin verða væntandi liðug um tríggjar mánaðir, tá verður arbeiðið at byggja skúlan boðið út.

Eftir ætlan skal skúlin vera liðugur til skúlaársbyrjan í 2008, meðan frítíðarskúlin og 1. til 3. flokkarnir skulu taka skúlan í nýtslu í januar 2008. Kostnaðurin á skúlanum verður mettur at verða 110 milliónir, umframt innbúgv og meirvirðisgjald.

Skúlin verður í fýra lonum og flokkarnir verða deildir upp eftir aldri. Eisini verður felagsøki, kantina og dupult fimleikahøll.

Hóast Hoyvíkar skúli júst er vorðin útbygdur, heldur Heðin Mortensen, at tað er stórur tørvur á hesum nýggja skúlanum. Tað er stórt trýst á skúlunum í býnum og orsøkina heldur Heðin Mortensen millum annað vera, at nógv nýbygging er í Hoyvíkshaganum, har eini 170 nýggj hús eru bygd tað síðsta árið.

Skúlin á Løgmannabreyt er fyrsta stig í útbyggingini av skúlaverkinum í Tórshavnar kommunu. Bæði í Argja skúla og Velbastaðar skúla er plásstrot og har er neyðugt at byggja út. Harafturat er ætlanin eisini at byggja ein nýggjan skúla úti á Fløtum í staðin fyri núverandi Venjingarskúlan.



*Sáttmálin um útgrevsturin verður undirskrivaður. Frammanfyri sæst modellið av nýggja skúlanum*

Stórt úrval av bátum
Vitja okkum í Vestmanna



STUBBIN Fjarðarvegur 12, Vestmanna
Tlf. 471 800 stubbin@stubbin.fo www.stubbin.fo

## FAKTA

**Skúlin á Løgmannabreyt:**
9 árgangir
Tveir flokkar í hvørjum árgangi,
Frítíðarskúli til næmingarnar í 1. og 2. flokki.
450 næmingar
Stødd: 6255 m2

## FAKTA

**Tíðarætlan:**

| | |
|---|---|
| **Juni 2006:** | jørðarbeiðið byrjar |
| **Januar 2008:** | 1.-3. flokk og frítíðarskúli |
| **August 2008:** | skúlin liðugur |